# Stór JólaGospelkonsert á Hálsi

**18. desember verður ein stór gospel konsert í høllini á Hálsi. Kendir føroyskir tónleikarar, sum t.d. Heini Lützen, Salt, Anna D. Háberg, Credo og Direct Level verða ímillum nøvnini á pallinum. Eisini verða dramabólkar og dansur á skránni**

KONSERT
*eydna@sosialurin.fo*

Tað eru starvsfólk, børn og ung frá Margarinfabrikkini, ið fyrireika stóru JólaGospel Konsertina. Tey hildu nevniliga at slíkar konsertir mangla í Havnini.

– Tað er fyrstu ferð í langa tíð, at eitt sovorðið tiltak verður fyriskipað í Tórshavn. Eysturoyggin er kend fyri teirra konsertir, men tað hevur manglað í Havnini, tí valdu vit at skipa fyri einari stórari gospelkonsert. Og tað vísir seg eisini, at fólk eru sera spent og áhugað í konsertini, sigur Siri Hansen, eitt av starvsfólkunum á Margarinfabrikkini í einum tíðindaskrivi.

Hon sigur, at børn og ung í Margarinfabrikkini eisini hava hjálpt sera væl til, at fáa konsertina á føtur.

– Tað eru ikki bert starvsfólkini, ið skipa fyri. Børn og ung í Margarinfabrikkini eru eisini við at skipa fyri. Tey hava fingið ymiskar uppgávur útdeildar og uttan tey, hevði tiltakið verið nærum ógjørligt at fáa upp at koyra so lættliga, sum tað hevur, sigur Siri Hansen.

**Fjølbroytt skrá**

Heine Lützen fer at hava eitt orkestur afturat sær og fer at spæla meiri kend løg, harímillum eisini jólaløg.

Salt, sum eru fløguaktuell í løtuni, koma eisini við orkestrið. Tey hava fingið kendar tónleikarar afturat sær, millum aðrar er James Olsen ein.

Anna D. Háberg verður heldur ikki einsamall á pallinum, men fer somuleiðis at hava tónleikarar við. Hon fer at framføra meiri róligan og avslappandi tónleik.

Credo og Direct Level fara at spæla tað, teir eru kendir fyri. Credo meiri bleytan popptónleik, og Direct Level fer at framføra meiri rockandi tónar. Hesir bólkarnir fara eisini at spæla nøkur jólaløg, tó við egnum tulkingum.

Dramabólkarnir og dansibólkurin Color, fara at framføra ymiskar andaligar tulkingar. Millum annað fer dramabólkurin úr KFUM úr Klaksvík at vísa teirra tulking av jólaevangeliinum.

Tey á Margarinfabrikkini vóna, at hetta kanska verður byrjanin til eitt breiðari tónleikalív í Havnini.

Konsertin verður í høllini á Hálsi, leygarkvøldið 18 des kl 20.00.

# Vanlukkutrygging til skúla- og ansingarbørn

**Tryggingarfelagið Føroyar hevur gjørt sáttmála við flestu kommunur í landinum um vanlukkutrygging av skúlabørnum upp til 10. Flokk og børnum í ansing. Men fyri at binfa um heilan fingur, kunnu foreldur eisini vanlukkutryggja síni børn – fyri hálvan prís restina av árinum**



TRYGGING
*eydna@sosialurin.fo*

Avtalan, sum tryggingarfelagið hevur gjørt við landsins kommunur, fevnir um allar vannlukku- ella skaðatilburðir, sum henda í skúla ella á ansingarstovni. Eisini um óhapp skuldi hent á útferðum, sum skipað verður fyri. Tá talan er um børn í skúlaaldri, fevnir tryggingin eisini um ferðing ella flutning beinleiðis til og úr skúlanum.

Tryggingarfelagið vísir á, at tað kann vera so skjótt, at ein tonn ella einar brillur brotna, ella at aðrir smávegis skaðar koma fyri, sum kunnu merkja eyka útreiðslur til foreldrini. Men vanlukkutryggingin tekur broddin av hesum, so trygd fæst fyri, at endurgjald verður latið, tá skaðin skal viðgerast. Eisini, um tað ikki er fyrr enn nógv seinni.

**Gott tilboð júst nú**

Men avtalan er ikki galdandi fyri ta tíðina, ið barnið ikki er í skúla ella á ansingarplássi. Tí metir tryggingarfelagið Føroyar, at tað er sera týdningarmikið fyri foreldur at tekna eina slíka trygging. Tey vísa á, at foreldur ofta hava nógvar tryggingar av ymsum slagi, men at tey ofta gloyma at tryggja síni børn.

Tølini siga, at umleið 1400 børn hava í dag eina vanlukkutrygging. Av teimum eru 900 í skúlaaldri.

Av teimum 725 børnunum, sum byrja í 1. flokki, eru bert eini 50-60, sum eru tryggjað. Hetta svarar til minni enn 10%.

Men restina av árinum, ætlar Tryggingarfelagið at geva foreldrunum eitt gott tilboð. Nú verður nevniliga møguligt at tekna privata vanlukkutrygging, íroknað barnavanlukkutrygging, har fyrsta ársgjaldið er fyri hálvan prís.

Tryggingarfelagið mælir tí øllum til at tryggja børn síni væl, so tey altíð kunnu vera »trygg á leiðini«, hvar tey so eru og hvat tey so gera, alt samdøgrið.

# Løgreglan skiftir ham

**Komandi árini fer ein útskifting at fara fram innan donsku – og harvið eisini føroysku, løgregluna. Talan er um nýtt snið av klæðum og eitt nýtt eyðkennismerki, ið fer at prýða bilar, búnar og tílíkt, ið hevur við løgreglu-arbeiðið at gera**

LØGREGLAN
*eydna@sosialurin.fo*

Endamálið við hesi nýgeran er at tryggja eina einsháttaða mynd av danska politinum.

Ríkispolitichefurin, Torsten Hesselbjerg, sigur, at búnin og búmerkið hjá politinum eru ein týðandi partur av hvussu fólk síggja løgregluna. Tí er tað týdningarmikið, at sniðið, ið løgreglan nýtir, sendir tey røttu tekinini út til fólk, soleiðis at eingin ivast í, at talan er um løgregluna í Danmark, tá tey síggja sniðið. Tekinini skulu vera, at talan er um ein rættarverjandi myndugleika, ið hevur autoritet og sterka søguliga støðu, samstundis sum hann eisini er ein nýmótans felagsskapur.

Nýggja búmerkið verður at síggja á bilum, búnum, motorsúkklum og øðrum hjá løgregluni.

Grundliturin er myrkabláur, við einum nýggjum búmerki og nýggjum vápnaskjøldri, nýggjum prýði og nýggjari skrift.

Reyði tráðurin í nýggja sniðinum hevur verið sjónligheit, trygd og at fólk skulu kenna løgregluna aftur.

Sum nakað nýtt vera týðilig endurskin eisini at síggja á politibilum.

Útskiftingarnar fara at koma so við og við sum útgerðin hjá løgregluni treingir til at skiftast.

Í Føroyum skiftir løgreglan ham í komandi ári.




## Strangari matvøru-reglur

**Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur nú gjørt greitt, at reglurnar um at flyta privata matvøru til Danmarkar og restina av ES, eru vorðnar strangari**

MATVØRA
*eydna@sosialurin.fo*

Heilsufrøðiliga Starvsstovan vísir á, at á heimasíðuni hjá Fødevarestyrelsen í Danmark, www.foedevarestyrelsen.dk, undir linkinum »fødevarer« og síðani «privat indførsel«, standa nýggju reglurnar fyri innflutningi av matvørum til Danmarkar.

**Reglurnar fyri Danmark**

Sambært heimasíðuni eru reglurnar nú soleiðis, fyri mar antin í viðføri ella í pakka:

– Fisk og fiskavøru, íroknað t.d. turran og ræstan fisk, óavmarkað mongd.

Seyða- og neytakjøt og aðra matvøru, í mesta lagið 5 kilo.

Samsending av mati er loyvd. Tað vil siga, at tað er loyvt at senda fleiri pakkar til sama bústað. Treytirnar eru:

At ein váttan fylgir við pakkanum, har navn og bústaður á øllum móttakarum stendur á.

At hvør pakki í mesta lagi vigar 5 kilo.

At kjøtið er til egna nýtslu

**Reglurnar fyri onnur ES-lond**

Til onnur ES lond enn Danmark hava føroyingar ikki loyvi at taka føroyskar kjøtvørur við ella senda føroyskar kjøtvørur til. Best er at venda sær til myndugleikan í viðkomandi landi, sum tú ætlar at hava mat við ella senda mat til, og spyrja um reglurnar har.